# Fimm línuskip landaðu í Klaksvík

**Klakkur hevði størstu nøgdirnar og fekk miðalprísin 15,80 krónur fyri kilo**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nógvur línufiskur er komin upp á land í Klaksvík hesa vikuna.

Mánadagin vóru fimm línuskip inni, harav Klakkur hevði størstu nøgdirnar – ella tilsamans 125.000 pund.

Hini skipini, Polarstjørnan, Ågot, Núpur og Kvikk, høvdu um 80.000 pund í part.

Polarstjørnan, sum liggur við Kósabrúnna í morgun, hevði 84.000 pund. Teir hava roynt á Munkagrunninum, og eini 40.000 pund av veiðini var hýsa. Hini fiskasløgini vóru longa (9.000), brosma (5.000), og síðan var restin steinbítur, hvítingur, havtaska og onnur fiskasløg.

**Góður túrur**

Klakkur, sum hevði størstu nøgdirnar hesaferð, hevði stívliga 40.000 pund av hýsu, 20.000 pund av longu 18.000 pund av brosmu, og síðan høvdu teir eisini nakað av toski, havtasku og øðrum fiskasløgum.

Á Landingarmiðstøðini í Klaksvík siga tey, at Klakkur seldi lastina fyri miðalprísin 15,80 krónur fyri kilo.



*Polarstjørnan liggur við Kósabrúnna í morgun. Eins og fýra onnur línuskip, løgdu teir veiðina upp í Klaksvík mánadagin Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Eru ikki so spentir at loysa

ÚTRÓÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Eg haldi ikki, at útróðrarmenn eru so spentir at loysa í løtuni. Fiskiskapurin hevur verið á eini leið, men hýsuprísurin er lágur, og agn og egning eru dýr.

Tað sigur maðurin, vit tosaðu við á Landingarmiðstøðini í Klaksvík í morgun.

Hann vísir á, at herfyri fiskaðu útróðrarbátarnir væl, men síðan minkaði fiskiskapurin nakað, samstundis sum hýsuprísurin er lækkaður.

– Teir stóru útróðrarbátarnir hava tó fingið hampiliga væl, upp í eini 7.000-10.000 pund á setuna. Teir hava soleiðis ligið um eini 100-150 pund á línuna.

Lagt verður aftrat, at skal ein seta eftir hýsu í løtuni vera lønandi, er neyðugt, at rættiliga væl er á línuni.

Á Landingarmiðstøðini í Klaksvík siga tey, at hýsuprísurin á bretska marknaðinum er fallin, og høvuðsorsøkin er, at norðmenn í løtuni senda so nógva hýsu á marknaðin.



*Reiðaríir og sølufeløg royna í sínum lagi at fáa mest møguligt fyri fiskin, og á Fiskamarknaði Føroya (mynd) royna tey eisini at gera sítt besta Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Styrkin við FMF er seljarar og keyparar

**Tað nyttar so lítið hjá reiðaríum og sølufeløgum at bjóða upsa út á fiskamarknaðinum, tá ið teir frammanundan hava mettað marknaðin**

MARKNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Gamalt orðafelli sigur, at tá ið "krubban er tóm, bítast hestarnir". Sama kann sigast, tá ið krubban er ov full; tá er ikki ókent, at ymisku liðirnir í vinnuni kunnu "sparka" eftir hvørjum øðrum.

Skipini fáa nógvan upsa, og á virkjunum verður roynt at arbeiða undan.

Stórt útboð, merkir vanliga lækkandi prísir, og soleiðis er eisini við upsaprísinum, sum er fallin seinastu tíðina.

Onkur sparkar eftir Fiskimálaráðnum, tí teir ikki – eins og teir gjørdu fyri einum ári síðan – loyva innfrysting av smáum upsa, sum kann taka ringasta trýstið.

Onkur annar heldur, at marknaðurin má ráða sær. Tað gevur kanska bíligari rávøru.

Reiðaríir og sølufeløg royna í sínum lagi at fáa mest møguligt fyri fiskin, og á Fiskamarknaði Føroya royna tey eisini at gera sítt besta.

Skipaeigarar og fiskimenn fýlast á, at upsin ikki hevur betri prís á Fiskamarknaðinum, og á Fiskamarknaðinum hava tey tann trupulleika, at teir, sum eiga/ selja fiskin, fyrst "metta" virkini, áðrenn teir bjóða tað, sum tá er eftir, til sølu á marknaðinum.

Tað hongur ikki saman.

Styrkin við FMF er seljarar og keyparar, og tað nyttar so lítið hjá reiðaríum og sølufeløgum at bjóða upsa út á fiskamarknaðinum, tá ið teir frammanundan hava mettað marknaðin.

## Norðmenn trýsta prísin á hýsuni

MARKNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ein orsøkin til, at prísirnir á hýsu eru lækkaðir seinastu dagarnar er sambært vælvitandi keldum í fiskivinnuni, at norðmenn seinastu tíðina hava sent stórar nøgdir av hýsu á bretska marknaðin.

– Hetta hevur ført til prísfall á marknaðinum.

Norðmenn geva nevniliga "leyst" at fiska hýsu í einar 14 dagar til tríggjar vikur um hesa tíðina, og tá fer hvør fjøl, sum hevur rættindi til hetta tilfeingi, at fiska.

– Fiskað verður sum "ørt" hesar dagarnar, og síðan steðgar veiðan aftur.

Keldurnar siga, at sama vanliga hendir um heystarnar, tá ið norðmenn aftur geva "leyst".

– Í slíkum føri kemur ein rúgva á hýsu á bretska marknaðin, og prísirnir fella.

Lagt verður aftrat, at prísirnir plaga at hækka aftur, tá ið hendan tíðin er av.

Tað merkir so aftur, at vónir eru um, at hýsuprísurin á føroyska marknaðinum fer at kvinka uppeftir aftur um ikki so leingi.